# Klæmint Nicodemussen 90 ár



Sosialurin hittu Klæmint og Rasmus í Soylu í 1992 á eini ferð í Sandoynni. Klæmint er vinstru megin í myndini

*Mynd: Kalmar*

Mánadagin fyllir ein kendur heimansandsmaður 90. Tað er Klæmint hjá Nielsi og hann er enn frammi hvønn einasta dag.

Seinastu tíðina er Klæmint vorðin landskendur, tí hann hevur luttikið í Frívaktini, ein sendingini hjá Elis í útvarpinum, og hann hevur sligið sítt navn rimmarfast í minni føroyinga, eina og bygdarmaðurin Dánjal í Klingruni gjørdi tað fyrst í sjeytiárunum. Í hesum sendingum hevur Klæmint greitt frá lívinum og serliga teimum mongu árunum á sjónum. Klæmint er, sum so mangur úr Sandoynni, ein framúr góður frásøgumaður og eygleiðari og nógv gullkorn eru komin fram í hesum sendingum.

Abbabørn siga um abban, at hann er ein frískur gamal maður og her meina tey, at hann er lætt sintur og stuttligur. Men hann er eisini snarsintur, og gongur í móti, so hvessir hann. Hann er góður við børn, hevur áhuga fyri teimum, er tolin og tímir at spæla við tey. Hann brennir eftir at fortelja teimum tað hann sjálvur veit og minnist.

Klæmint hevur ført og átt skip og hann hevur altíð verið bundin at sjónum. Hevur hann ikki verið umborð á skipi, so hevur hann róð út og mangan fongin hevur hann ført til lands.

Klæmint hevur mangan brættan farið. Hann sigldi undir krígnum og slapp ikki ómerktur frá hesum. Um summarið 1942 førdi hann trýmastraðu skonnartina "Polarbjørn" Teir fluttu fisk úr Íslandi til Bretlands. Avegis niður til Aberdeen vórðu teir álopnir av einum týskum flogfarið. Teir máttu í bátarnar og "Polarbjørn" sakk. Allir komu livandi frá hendingini, tó við snuddum. Klæmint fekk sjálvur eitt granatsplintur í armin. Hetta varð skorið úr aftur og hann goymir splintrin sum minnið um hendingina.

Klæmint eigur eitt sindur av jørð og hann hevur altið áhuga fyri seyði. Nú gongur hann ikki longur tí haganum, tí sjónin bilar og hann hoyrir heldur ikki so væl longur.

Klæminti hjá Nielsi verður ynskt ein góðan føðingardag og alt tað besta og tað eru abbabørn sum eru aftanfyri orðini í hesi heilsan.




†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra systir okkara

**Gunnhild Guttesen**

fór heim til Harran 20. sept., 78 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi sunnudagin kl. 15.00.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer týsdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Óli Jógvan Guttesen**






